Tórshavn 27 juni, 2022

# Hjáveiða av sjófugli í sambandi við línufiskiskap

## Innleiðing

Marine Stewardship Council (MSC) hevur í síni góðkenning av føroyskum fiskiskapi á Føroyaleiðini sum burðardyggan sett sum treyt, at vinnan saman við Havstovuni ger eina árinsgreining av ávirkanini av fiskiskapi á hótt djórasløg, serliga sjófugl. Neyðugt er tí at fáa til vegar hagtalstilfar, sum vísir støðuna og gongdina í stovnunum hjá hesum hóttu fuglasløgum. Av tí at slíkt hagtalstilfar ikki er tøkt, hevur MSC ikki kunnað givið eina treytaleysa góðkenning av føroyskum fiskiskapi eftir botnfiski undir Føroyum.

Vandi er tí fyri, at føroyski fiskiskapurin missir sínar MSC-góðkenningar, um stig ikki verða tikin til at fáa til vegar nøktandi hagtalstilfar til at gera hesar árinsgreiningar. Harumframt fær føroyska fiskivinnan javnan krøv frá øðrum altjóða djóraverndarfelagsskapum um at hava betri hagtøl og gransking av støðuni hjá hóttu djórasløgunum í Føroyum.

Aktørar í fiskivinnuni hava við stuðli frá Fiskivinnuroyndum tikið stig til at stovna felagið Sustainable Fisheries Faroe Islands (felag undir stovnan), sum saman við Havstovuni fer at standa fyri hesi forkanning til eina granskingarverkætlan.

Úrslitini frá slíkari granskingarverkætlan, sum forkanningin skal kortleggja, eru ein fortreyt fyri, at føroysk fiskiveiða í framtíðini kann nevna seg burðardygga. Harumframt vil hagtalstilfarið eisini kunna brúkast av føroyskum myndugleikum til at gera hóskandi inntriv, um neyðugt, til at tryggja at føroyskur botnfiskiskapur undir Føroyum veruliga er burðardyggur.

Endamálið við granskingini er sostatt at skapa grundarlag fyri afturvendandi árinsgreiningum av botnfiskiskapinum undir Føroyum í mun til hótt djórasløg, herundir sjófugl. I fyrstu atløgu verður søkt um stuðul til eina forkanning, sum síðani kann brúkast sum grundarlag fyri eini størri kanning og eini kjølfestan av slíkum afturvendandi kanningum. Forkanningin fer at lýsa, hvussu nógv hjáveiðan av sjófugli er í línufiskiskapinum í føroyskum sjóøki.

## Mannagongd

Fyri at fáa hagtøl fyri hjáveiðuna av sjófugli, var avtala gjørd við línuskipini Kvikk og Núpur, um at hava eyðgleiðara við umborð, ið skuldi skráseta hjáveiðuna. Víðari var neyðugt at skráseta:

- Dato
- Tíð á degnum
- Knattstøðu
- Hvat slag av agni, ið nýtt var
- Nær línan var sett/drigin
- Veðrið
- Tal av húkum settir

- Tal av húkum kannaðir
- Tal av fugli á línuni

Upprunaætlanin var, at eygleiðarin skuldi verða við fleiri ymsum skipum alt árið, men av ymsum orsøkum endaði tað við, at hann bert var við tveimum ymsum skipum. Ein túr við Kvikk og tveir túrar við Núpi, tvs tríggjar túrar tilsamans.

## Úrslit og viðgerð

Hesar tríggjar túrar vóru:

- 771170 húkar settir
- Av teimum kannaði eygleiðarin 481800 húkar
- Samlað tal av fugli á línuni var 63. Av hesum vóru 61 havhestar, og verður víðari viðgerðin tí við serligum fokus á havhestin
- Hetta svarar til at 1 havhestur var á, fyri hvørjar 7898 húkar, ið vóru kannaðir.
- Hetta merkir, at umleið 100 havhestar endaðu sum hjáveiða hesar tríggjar túrarnar (98)
- Nógv mest av havhesti var á línuni í junimánað (tá var talið 1 havhestur á, fyri hvørjar 3151 húkar settir)

Í hesi forkanning fingu vit data frá trimum túrum, við tveimum ymsum skipum, og kunnu vit tí ikki siga við vissu, hvørja ávirkan samlaði línufiskiskapurin í føroyskum sjóøki hevur á fuglastovnarnar. Men um vit ganga út frá, at sannlíkindini eru tey somu fyri, at havhestur kemur á línu, óansæð hvat skip tað er, ið setur línuna, ber til at rokna út samlaðu hjáveiðuna av havhesti.

Fyri at gera tílíkar útrokningar er neyðugt at vita samlaða talið av húkum, ið verða settir í føroyskum sjóøki. Eitt tílíkt yvirlit finst ikki, men út frá samrøðu við fólk í vinnuni, verður talið mett at verða uml. 75 milliónir húkar árliga. Tá eru bólkur 5a og 5b, í partvís fiska við línu, ikki við.

Útfrá hesum metingum verður samlaða árliga talið av havhesti sum hjáveiða: 75.000.000/7.898 = 9.496. Tvs at uml. 9500 havhestar doyggja árliga sum hjáveiða í línufiskiskapi. Fyribilskanningar av havhestinum, ið var á línuni í juni, vístu, at talan serliga var um reiðrandi fugl, og er hetta ógvuliga óheppið. Tað merkir, at ungin helst eisini doyr, síðan tað er avbera trupult hjá einum foreldrafugli at bera neyðugu mongdina av føði. Við øðrum orðum er veruliga talið av fugli, ið doyr orsakað av línufiskiskapinum, allarhelst væl hægri enn mett í hesi kanning.

## Hvussu er støðan hjá havhestinum í Evropa?

Orsakað av niðurgongdini í havhestastovninum frá 1980´unum til 2010´ini var havhesturin í Evropa fluttur á sonevnda Reyðlistan hjá International Union for Conservation of Nature (IUCN) frá “Least concern” til “Vulnerable”. Hetta hendi í 2018, og merkir tað, at mett verður at stovnurin í Evropa er væl verri fyri enn áður hildið, og er tað tí av enn størri týdningi at fáa álítandi hagtøl fyri hjáveiðu av havhesti sum skjótast.



Mynd 1. Í 2018 var havhesturin fluttur frá "Least concern" til "Vulnerable" á sonevnda Reyðlistanum hjá IUCN.

## Framtíðar innsavning av hagtalstilfarið

Av tí at tað er ymiskt hvat data er tøkt, ella møguligt at fáa hendur á ymsastaðni í heiminum, eru nógvir ymsir háttir til at samlað og viðgera hagtalstilfarð um hjáveiðu av sjófugli. Í nógvum føri er hagtalstilfarið ikki nøktandi, ella hevur veikleikar, ið gera tað torført at greina taltilfarið. Tí var avgjørt at menna egnar mannagongdir í hesi verkætlan, fyri at fáa so gott og neyvt data um hjáveiðu sum gjørligt (sí mannagongd). Hetta eydnaðist stak væl, við tað at nýtta mannagongdin gevur eitt rættiliga neyvt tal av fugli, samanborið við samlaða húkatalið. Tí verður mælt til at nýta somu mannagongd frameftir.

Ein stórur veikleiki við hesi kanning var at eyðgleiðari bert var við tríggjar túrar og við tveimum skipum. Fyri at kunna gera eina so álítandi árinsmeting sum gjørligt, í samband við fiskiskap og sjófugl, má ein størri verkætlan setast í verk, har fleiri eygleiðarar verða við fleiri skipum, og at fylgt verður við alt árið, fleiri ár á rað.

Eisini er alneyðugt við einum yvirliti yvir samlaða húkatalið, ið verður sett í føroyskum økið ígjøgnum árið. Hetta tí tað sær út til at verða rættiliga stórur munur á hvussu nógvur sjófuglur endar sum hjáveiða ymsa tíð av árinum. Men av tí at vit ikki vita hvussu nógvir húkar verða settir, hvørja tíð av árinum, mugu vit halda okkum til eitt miðaltal fyri alt árið.

Um veiðan/mána verður nýtt sum umboðandi fyri hvussu nógvir húkar verða settir/mána, sæst at færri húkar verða settir í juni, tá sjófuglahjáveiðan er hægst/húk, enn í t.d. september. Hetta kundi týtt uppá at hjáveiðan av sjófugli er lægri enn roknaða miðaltalið fyri árið (Mynd 2). Tað skal tó viðmerkjast at skipini í kanningini settu fleiri húkar í juni (314870) enn í mai (250900) og september (205400).

P.O.Box 3051 · Nóatún 1
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo




Mynd 2. Mánaðarliga veiðan í kg í 2021, sambært avreiðingarseðlum, og tíðarskeiðini tá kanningarnar av hjáveiðu av sjófugli vóru gjørdar. Veiðuhagtølini eru fyri bólk 3, bólk 4 og bólk 5A og 5B.